# Føðingardagsynskið er




*Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya hevur síðan 1. ugust 2008 verið partur av Fróðskaparsetri Føroya. Súsanna Mortensen er rektari*

**Í dag eru 50 ár liðin, síðan Sjúkrarøktarfrøðiskúlin var settur á stovn. Føroyska útbúgvingin hevur altíð verið á høgum stigi og føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar hava havt lætt at fingið arbeiði í øðrum londum. Skúlin hevur fylgt við í altjóða menningini av útbúgvingini til sjúkrarøktarfrøðing, og í dag er útbúgvingin akademisk og gevur heitið Bachelor of Science in Nursing**

50 ÁR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Fyri 1960 var útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing meistaralæra. Næmingarnir fóru beinleiðis á eitt sjúkrahús at læra, og eingin skúli var.

1. januar 1960 varð útbúgvingin innskipað, og í dag hevur útbúgvingin sostatt 50 ár á baki, um enn útbúgvingin nakrar ferðir síðan er broytt nógv.

Útbúgvingin var grundað á danska lóg og fyrisiting frá 1960 til 2003, og hon fylgdi teimum broytingum sum vóru í Danmark. 3 útbúgvingarskipanir hava verið, frá 1960 til 1979, frá 1979 til 1990 og frá 1990 til 2003, tá ið skúlin var yvirtikin, og útbúgvingin akademiserað.

Skúlin var øll árini knýttur at Landssjúkrahúsinum, men tá ið skúlamál vórðu yvirtikin, varð Sjúkrasystraskúli Føroya, sum skúlin æt tá, lagdur undir Mentamálaráðið.

Í sambandi við tey 50 árini hevur skúlin, sum heldur til í Jónas Broncksgøtu 25, móttøku í dag.

## Akademikarar

Í 2003 varð føroysk lóg og kunngerð gjørd fyri skúlan, og farið varð at akademisera útbúgvingina. Sjúkrarøktarfrøðingarnir skuldu hava eina bachelor-útbúgving í sjúkrarøkt.

Kravið til hetta var, at allir lærararnir máttu uppskúlast.

Útbúgvingin er nú ein akademisk útbúgving og fyri at vera á jøvnum føti við universitetsútbúgvingar, skulu lærararnir hava granskingarførleika, men so langt er ikki komið enn. Skúlin er frá 1. august 2008 partur av Fróðskaparsetri Føroya.

– Vit hava síðani útbúgvingin varð akademiserað lagt høvuðsdentin á at menna útbúgvingina. Hetta merkir, at vit hesi árini hava skipað útbúgvingina soleiðis, at lesandi læra at tilogna sær vitan eftir akademiskum leisti og at nýta hesa vitan tilvitað í kliniska eins og ástøðiliga partinum av útbúgvingini, sigur Súsanna Mortensen, rektari á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya.

Hon heldur útbúgvingina vera góða, og tað vísir seg eisini, at føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar eru líka væl umtóktir uttanlands, sum teir altíð hava verið. Tað hongur eisini saman við, at føroysku sjúkrarøktarfrøðinganir hava so breiða vitan, hava roynt eitt sindur av hvørjum, í staðin fyri at hava arbeitt burturav á eini serdeild.

Smærri tillagingar verða javnan gjørdar fyri at gera útbúgvingina enn betri.

Útbúgvingin er samansett av hálvum triðja ári í skúla og hálvum øðrum ári úti í klinikkini.

Lesandi fáa ikki longur løn í útbúgvingartíðini men fáa lestrarstuðul sum onnur.

## Færri umsøkjarar

Í Danmark er týðiligt, at kreppan hevur fingið fleiri at søkja inn til útbúgvingina, og har er eisini gjørt eitt stórt miðvíst arbeiði fyri at fáa fleiri at søkja inn á skúlarnar.

Í Føroyum hevur talið av umsøkjarum verið fallandi síðan 2003, men ongantíð so lágt, at ikki bíðilisti hevur verið.

– Vit vita ikki rættiliga, hví tað hevur verið so, men tað sama er hent í fleiri øðrum londum, sigur Súsanna Mortensen.

Útbúgvingin av sjúkrarøktrarfrøðingum hevur havt stóran samfelagsligan týdning í Føroyum og haraftrat ikki minst kvinnupolitiskan, tí útbúgvingin var ein tann fyrsta, sum gav kvinnum livibreyð. Sum útbúnir sjúkrarøktarfrøðingar kundu tær uppihalda sær sjálvum og mangan familjuni við, og tær kundu eisini fara yvir um landamørk at arbeiða.

## Alheims útbúgving

– Tað hevur ongantíð verið trupult at fáa arbeiði sum sjúkrarøktarfrøðingur, uttan kanska beint nú í Danmark, har so stórar sparingar eru gjørdar. Annars er stórur eftirspurningur eftir sjúkrarøktarfrøðingum, londini stjala frá hvørjum øðrum. Gongdin er, at tey fátøku londini verða drenað fyri góðar sjúkrarøktarfrøðingar, sum fara í onnur lond at arbeiða fyri at fáa betri løn. Tað fáa vit illa gjørt nakað við. Leggjast kann aftrat, at tað er upp á sama máta, sum tá ið vit í Føroyum útbúgva sjúkrarøktarfrøðingar og sjómenn, sum fara í onnur lond at arbeiða, sigur Súsanna Mortensen.

– Hon heldur, at ein orsøk til fallandi talið av umsøkjarum er tann neiliga umtalan, ið hevur verið av fakinum. Frágreiðingar um strævið arbeiði, ið verður strævnari og strævnari, lokka ikki júst.

## Menning

– Skúlin tekur 22 lesandi inn í september á hvørjum ári. Tað er eitt sindur torført at gera upp neyvt, hvat kemur burturúr, tí summi flyta av landinum at gera seg liðug. Nøkur søkja inn á danskar skúlar og koma til Føroya at fullføra útbúgvingina. Av tí at flestu lesandi eru ungar kvinnur, hendir tað meira enn so, at lesandi fara frá vegna barsilsfarloyvi.

– Í sambandi við at út-